Mette Karoliussen, lektari á Telemarkens Sykepleierhøjskole:

– Setið eisini ein sjúkrasystrastjóra

Sjúkrarøktin hevur alstóran týdning fyri sjúklingarnar. Hon má tí fáa hægri prioritet og verða meira vird í heilsuverkinum. Ein sjúkrasystrastjóri hevði kunnað bøtt nógv um hesi viðurskifti. At spara uppá og undirmeta sjúkrarøktina verður í síðsta enda nógv dýrari fyri samfelagið og ringast fyri sjúklingin.

Orð Jan Müller
Mynd Kalmar Lindenskov

Í september mánað í fjør varð hildin stór ráðstevna fyri sjúkrasystrar í Føroyum. Evnið varð "Sjúkrasystrar sum starvsbólkur". Í hesum sambandi vitjaðu fleiri útlendskir kapacitetar innan sjúkrarøkt, tað verið seg innan vanligt røktarbeiði, leiðslu, undirvísing og gransking.

Teirra millum var Mette Karoliussen úr Noregi. Hon er lektari á Telemarken Sykepleierhøjskole.

Í innleggi sínum á ráðstevnuni tosaði hon um røktarspurningar sum heild, men nam eisini við mál, sum hesa seinastu tíðina hava verið nógv frammi í almenna orðaskiftinum. Eitt nú spurningin um at seta ein sjúkrasystrastjóra innan føroyska sjúkrahúsverkið.

Aftaná ráðstevnuna hitti Sosialurin Mette Karoliussen og fara vit í dag at prenta samrøðuna.

Í dag hava annars føroysku sjúkrasystrarnar aðalfund í Havn, og ein av spurningunum, sum helst fer at verða umrøddur, er nettup gamla ynskið um at seta ein sjúkrasystrastjóra í sjúkrahúsverkinum.



Stríðist fyri yrki tykkara!

Hvør var so boðskapurin hjá Mette Karoliussen til føroysku sjúkrasystrarnar?

-Mín boðskapur var greiður. Hann var fyri tað fyrsta at fáa tær at vera ernar av sínum yrki, at verja tað og stríðast fyri tí.

Og her er tað kanska mest umráðandi at steðga eitt sindur á fyri at gera sær greitt, hvat okkara yrki í veruleikanum stendur fyri.

Mette Karoliussen sigur víðari, at nógvar av teimum gomlu røktaruppgávunum hava verið gloymdar goymdar ella settar til síðis til fyrimunar fyri tann medisinska kunnleikan.

Við hesum sipar hon til tær atgerðir og arbeiðið, sum skal verja upplivingarøkið hjá sjúklinginum, sum eitt nú er at verja hann móti stress og angist umframt at stuðla sjúklinginum í ikki at missa vónina.

Nýggj gransking setir sjúkrarøkt í fokus

Tann nýggjasta granskingin á økinum vísir nevniliga, at umrøddu atgerðir (sygeplejehandlinger) hava sera stóran týdning fyri, hvussu organismen arbeiðir. Talan er um eina nýggja granskingargrein, sum kann fáa sera stóran týdning fyri, hvussu organismen arbeiðir.

Henda granskingargrein eitur "Psykoneuroemylogi" og vísir okkum, at tað, sum ein persónur upplivir, kann hava ávirkan longu á kyknustøði.

Mette Karoliussen ivast ikki í, at sjálv sjúkrarøktin tvs. "den nære sygeplejе" fer at fáa meira vind í seglini, nú henda umrødda granskingin er komin fram. Hon fer at geva røktini nýtt lív. Og hetta heldur hon eisini er tiltrongt, tí nógva staðni verður júst týdningurin av sjúkrarøktini undirmettur.

Mette Karoliussen sigur víðari, at tað tó ikki bert er sjúkrarøktin sjálv, sum hevur týdning, tað hevur málið við henni so sanniliga eisini. Tvs. at tað er ikki bert ein spurningur um at geva sjúklinginum mat, men tað er eisini avgerandi, hvat hann fær at eta, at føðsluvirðið er í lagi osfr.

Læknaarbeiðið

Mette Karoliussen sigur, at støðan í sjúkrahúsverkinum hevur higartil verið og er tað nógva staðni enn, at eyguni verða mest vend móti læknaarbeiðinum og sjúkini og ikki móti tí, sum sjúkrasystirin stendur fyri, nevniliga røktini av sjúklinginum. Tað er líkasum at røktin kemur bert í 2. rað - er nakað sekundert.

Tað er henda hugburð, sum sjúkrasystrar í mongum londum eru farnar at broyta.

-Tí veruleikin er tann, at fær sjúklingurin ikki vanliga røkt, so nervar tað hann og harvið eisin í møguleikan at gerast frískur.

Nýggja granskingin innan sjúkrarøkt og sjúklinginum sjálvum vísir, at verður allur denturin bara lagdur á skjóta læknaviðgerð, eitt høgt tøkniligt stoði, og røktin verður sett til síðis, so liðir hann undir tí.

Mette Karoliussen sigur, meðan vit nógva staðni siggja, at tað eru læknarnir, sum standa ovast í pyramiduni í sjúkrahúsverkinum og taka allar avgerðir, so er hetta øðrvísi skipað í Noregi.

Har hava tey eina javnsetta leiðslu tvs. at har er ein sjúkrasystur, sum stendur á odda - er stjóri - fyri røktini og síðani ein lækna, sum stendur á odda fyri medisinsku viðgerðini.

Við hesum sipar hon til nógv umrødda ynskið hjá føroysku sjúkrasystrunum, nevniliga at kunna seta ein sjúkrasystrastjóra við síðuna av læknastjóranum.

Talan er nevniliga um um tvey heilt ymisk fak - yrki.

-Sjálv haldi eg ikki, at vit kunnu vænta ella krevja av læknunum, at teir skulu skilja annað enn sítt egna fak. Vit menniskju skilja best tað, sum vit sjálvi fáast við og duga best.

Hesin norski forsprákarin fyri sjúkrarøktini heldur annars, at ein vansi hjá sjúkrasystrastættini í dag er tann, at hon dugir ikki nóg væl at formidla tað, sum hon stendur fyri. Nógv av tí tær gera er alt ov ósjónligt. Hetta eru oftani sera týdningarmiklar uppgávur, sum onnur ikki skilja ella duga ikki at taka í sama álvara.

-Eg plagi at siga við sjúkrasystrarnar, at tær kunnu ikki vænta, at onnur skulu viðurkenna tað tit gera, um tit ikki eisini sjálvar siga frá hesum.

Men hvat kunnu sjúkrasystrarnar tá gera fyri at gera vart við sítt yrki og týdningini av sjúkrarøktini!

-Tær mugu tosa meira og greiða meira frá. Eg haldi tað hevur stóran týdning at fáa fólk flest at lurta og harvið tryggja sær, at tey ikki halda, at alt, sum verður gjørt á eitt nú einum sjúkrahúsi er læknaarbeiði. Tí tað er tað jú ikki.

Uppá fyrispurning um sjúkrasysturin ikki vennir seg eitt sindur degraderaða í mun til læknarnar í dagsin heilsuverki og harvið ikki torir at gera vart við týdningin av sínum yrki, heldur Mette Karoliussen, at hetta er rætt skilt.

Kvinnur eru fyri tað fyrsta meira afturhaldandi enn menn. Tað vísir seg eisini, at tey, ið taka sær av røktini sum oftast eru kvinnur, meðan lækanarnir oftani eru menn.

Læknar royna at hava eina aðra medferð - arrogansu - fyri at hevda sítt fak. Teir kunnu tó so sanniliga eisini vera bangnir og ivandi, men tað er so ikki nakað, teir vilja vísa.

Í USA arbeiða læknar og sjúkrasystrar nógv meira á linju ístaðin fyri í einum hierarkii. Hetta er ikki altið so lætt fyri læknarnar heldur, tó at teir hava eina yrkisarrogansu, sum tað hevði tænt teimum at lagt burtur.

Mette Karoliussen heldur at sjúkrasystrar sjálvar mugu gera meira fyri at upplýsa um hesi viðurskiftini og um sítt egna arbeiðsøki.

Sjúkrarøktin hevur annars sína egnu lógir, rættindi og pliktir.

Er t.d. nakað, sum stríðir móti samvitskuni so er bara at siga, at hetta góðtekur ein ikki. Hetta mugu sjúkrasystrar læra seg heldur hon.

-Men er tú kløkk yvir at fretta, at tað í føroyska sjúkrahúsverkinum finst ein læknastjóri men ongin sjúkrasystratjóri?

-Í veruleikanum eri eg ikki tað. Tí soleiðis hevur tað verið mest sum alla staðni fyrr. Men vit vita, at hetta er ikki gott fyri sjúklingarnar. Fyri teir er tað rættiliga avgerandi at kunna fáa ta neyðugu røktina. Og her vita vit av royndum, at sjúkrarøktin verður ikki nóg væl tryggjað við aðrari fakligari leiðslu.

Ikki ov fá til sjúkrasystraleiðslueisini

-Men eru vit ikki ov fá í Føroyum - er sjúkrahúsverkið ikki ov lítið til, at vit eisini skulu hava ein sjúkrasystrastjóra?

-Tað haldi eg ikki. Tit nýtast sjálvandi ikki at byggja upp nakað stórt hieraki, men eg haldi, at tað má vera ein faklig kompetanca í leiðsluni, sum skilir røktarfakið.

Trupulleikin er tann, at læknar og almenningurin lata sum um, at talan er um eitt og sama fak, nevniliga viðgerð.

Mette Karoliussen ásannar, at tað tí nettup er ein stórur trupulleiki hjá røktini í dag, at fólk trúgva, at sjúkrarøkt bert er ein hjálpardisiplin hjá medisinfakinum. Hetta er ikki so.

Meðan læknar í stóran mun taka sær av sjúkuni, so taka sjúkrasystrarnar sær av persóninum, sum er sjúkur, og tað er nettup hetta, sum nú vísir seg at vera so týdningarmikið, nettup røktin av persóninum við øllum sum hartil hoyrir, og